


www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 08 - 2012

# Tætt oljufund á Cooper

Faroe Petroleum boðar nú frá úrslitinum av Cooper boringini í Norska Havinum. Centrica eigur 40% av loyvinum og er fyristøðufelag. Suncor og Faroe Petroleum eiga 30% hvør av loyvinum. 26. juli kunngjørdi felagið, at Cooper brunnurin hevði rakt við olju, at kanningar vórðu gjørdar, og at samtakið hevði avgjørt at gera eina útvinsluroynd fyri at meta um oljuna. Útvinsluroyndin er nú gjørd, og staðfest var, at oljan ikki rann. Trýstroyndir og aðrar kanningar vóru gjørdar av jarðgoymsluni, sum staðfestu, at renslið er avmarkað. Samtakið fer nú at meta um fundini og úrslitini av kanningunum, og hvat týdning hesi hava á restina av loyvinum. Sjálvt um úrslitið av útvinsluroyndini er skuffandi, so er fundið áhugavert, og framhaldandi kanningarnar fara vónandi at vísa, hví jarðgoymslan er tøtt, og um hetta er eitt lokalt fyribrigdi ella umfevnur alla oljukelduna. Boriverkætlanin hjá felagnum heldur fram, og borað verður á North Uist miðinum vestan fyri Hetland í løtuni, har BP er fyristøðufelag. Felagið luttekur eisini í Spaniards brunninum í bretska partinum av Norðsjónum, har byrjað verður at bora í oktober. Premier Oil stendur fyri hesi boringini sigur Faroe Petroleum frá í tíðindaskrivi.